## Toll- og Skattstova Føroya
**Stýrið**

# Fyribilsskattaskráin 2006

Rætting til lýsing í blaðnum í desember 2005.

**Fríir ágóðar**
Leiðbeinandi virðini fyri 2006 eru hesi:

| | | |
|---|---|---|
| **a. Virði á fríum bústaði, sí viðmerking** | kr./m² | 551 |
| **b. Eginnýtsla: sí viðmerking** | | |
| el | kr. | 7.800 |
| olju | kr. | 19.300 |
| fastnettelefon/fartelefon | kr. | 5.000 |
| **c. Frí vørunýtsla: sí viðmerking** | | |
| Bakarar | kr. | 4.200 |
| Bakarar við keypmansvørum | kr. | 11.300 |
| Keypmenn | kr. | 13.700 |
| **d. Virði á fríum kosti pr. dag, sí viðmerking** | | |
| 3 máltíðir | kr. | 50 |
| 2 máltíðir | kr. | 38 |
| 1 máltíð | kr. | 28 |
| **e. Virði á fríum bili (persónbilur/stationcar)** | | |
| 1100 kg og undir | kr. | 48.400 |
| 1101 kg til 1300 kg | kr. | 58.900 |
| 1301 kg til 1500 kg | kr. | 71.200 |
| 1501 kg og meira | kr. | 83.800 |
| **f.Vøruvognar av skapi og merki sum persónsvognar** 75% av ásetta virðinum | | |
| **g. Allir aðrir bilar** | | 50 % av ásetta virðinum |
| **h. Bussar upp til 10 persónar, sum verða nýttir til hýruvognskoyring** | kr. | 16.500 |
| **i. Eginnýtsla av bili hjá hýruvognsførarum** | kr. | 16.500 |

**Upphæddirnar eru íroknaðar meirvirðisgjald.**

**Aðrar upphæddir**

| | | |
|---|---|---|
| Kapitalpensjónsfrádráttur | kr. | 45.200 |
| Skattafrítøka fyri donsk lesandi | kr. | 66.000 |

**Til a.**
Roknað verður við einari upphædd, sum er fyri bústaðarøkið, ið viðkomandi hevur ræðisrætt yvir. Kjallari og loft, sum ikki eru innrættað, hjallur og bilhús koma ikki undir hugtakið bústaðarøki.

**Til b, c og d**
Privatur vinnurekandi skal skattast av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum, ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skattast av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til eginnýtsluna, t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

**Á Argjum, 2. mars 2006**



# MARKNAÐARDAGUR

verður í Sjónleikarhúsinum í Havn leygardagin 4. mars 2006, har bøndur og fyritøkur sýna fram hvat fæst burtur úr landbúnaðinum í Føroyum

**Skrá fyri dagin:**

| | |
|---|---|
| 10.00 | Húsið letur upp |
| 11.00 | Jógvan Arge tosar um vinnuligan landbúnað í Tórshavnar kommunu |
| 12.00 | Eyðstein Jensen skannar seyð |
| 13.00 | Hendrik Old tosar um vinnuligan landbúnað |
| 13.00 | Mótasýning við vørum frá MBM, Tøting og Sirri |
| 14.00 | Nicolina Beder tosar um føroysku ullina |
| 15.00 | Vísusangur við Jens Marna Hansen |
| 15.00 | Eyðstein Jensen skannar seyð |
| 17.00 | Bjarni Djurholm tosar um vinnuligan landbúnað |
| 17.00 | Mótasýning við vørum frá MBM, Tøting og Sirri |
| 18.00 | Húsið letur aftur |

Høvi verður at keypa smurt breyð við føroyskum viðskera og lutaseðlar við vinningum frá luttakarunum.

**BÓNDAFELAGIÐ og MBM**

## Leygardagin 4. mars verður Óla Christian Torskilsson við Sandá 30 ár



Óla Chr. er sonur Birgith og Torkil við Sandá, og er miðlingur av 5 systkjum. Unnusta hansara er Valborg Dam Jacobsen. Saman eiga tey sonin Bartal, umframt at Valborg eigur dóttrina Sóley.

Óla Chr. er sera avhildin, har hann kemur. Hann hevur við sínum barnsliga lyndi sera gott tekki á børnum, og dámar væl at spæla við yngra ættarlið, eins og hann stundum lænir leikur frá Bartal, sum hann stuttleikar sær óført við.

Óla Chr. er álitismaður, og er altíð fúsur um heitt verður á hann at taka eina hond í. Í frítíðini dámar honum øgiliga væl at fáast við at framleiða leikur, t.d. hevur hann gjørt 5 kassabilar, sum hann og Bartal stuttleika sær við, eisini hevur hann ein fjarstýrdan flúgvara, ið hann er sera kringur at flúgva við.

Á yrkisleið síni hevur Óla Chr. m.a. verið besti missilskjútti í Danska herinum. Hann bleiv útbúgvin Automatikmekanikari í 2001 og sigldi eftir tað við verjiskipunum Vædderen og Tetris undir Føroyum og í Grønlandi.

Í dag er Óla Chr. í starvi hjá Tórshavnar Komm-unu, har hann viðlíkaheldur býin.

**65**

Sosialurin 341800


# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

**22 50 00**

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ




www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo